HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 42

17. januar 2020
Mál: 20/00003-2
Viðgjørt: Rannvá Magnussen

**Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**

Almannamálaráðið hevur við telduposti dagfestur 23. desember 2019 sent Heilsumálaráðnum, uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin) og uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin) til hoyringar.

Freistin at gera viðmerkingar til uppskotini, var sett til 17. januar 2020.

Heilsumálaráðið viðmerkir einans tey viðurskiftir í lógini, ið møguliga kunnu hava ávirkan á heilsuøki.

Heilsumálaráðið hevur fylgjandi viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (Vælferðarlógin):

1. Forsorgarlógin heimilar sambært § 15 stk. 3 at lata fíggjarligan stuðul, tá persónur, ávístur av lækna, hevur fingið uppihald á eftirbataheimi. Heimildin er strikað við hesum lógaruppskoti. Heilsumálaráðið hevur sæð, at nú ásetingin verður strika, so verða umleið 350 tús. kr. í játtan um árið fluttar frá vanligari forsorg til Hvíldarheimið Nainu á fíggjarlógini.
2. Til § 3: Í hesi grein verður ásett, at ein ætlan skal gerast fyri hvønn einstakan persón, sum hevur umfatandi og samansettan tørv á hjálp. Heilsumálaráðið metir, at hendan grein samsvarar væl við tilmælið um samskipaða endurvenjing frá 2016. Hetta soleiðis, at ein borgari hevur rætt til endurvenjing frá Sjúkrahúsverkinum sambært sjúkrahúsverkslógini og Almannaverkinum sambært § 37 í vælferðarlógini, og harumframt hevur rætt til eina endurmenningarætlan, um hann hevur umfatandi og samansettan tørv á hjálp. Hetta fegnast Heilsumálaráðið um og metir, at borgarin við hesum verður tryggjaður eina betri tænastu.
3. Til § 29: Mælt verður til, at hjálparráð til varandi tørv bert verða umsitin av einum myndugleika. Sum er, umsitur Heilsutrygd í ávísum førum stuðul til hjálparráð til varandi tørv. Heilsumálaráðið mælir til at skipa soleiðis fyri, at Almannaverkið burturav umsitur hjálparráð til varandi tørv.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 304050 • hmr@hmr.fo

4. Til § 30: Mælt verður til at nágreina, at ásetingin eisini fevnir um Cocklear Implant (CI).

   - Heilsumálaráðið er av tí áskoðan, at sjálv viðgerðin tá CI verður sett inn, hoyrir til í heilsuverkinum, meðan tað eftirfylgjandi er talan um varandi kropsborðið hjálparráð.

Heilsumálaráðið hevur ongar viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (Tvingsilslógin).

Vegna Heilsumálaráðið

Jan Simonsen
deildarstjóri